# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Nýggir løgreglumenn



1. apríl 2006 hava Ragnar í Haraldstovu, Sørvágur (v.m.), og Jan Johannesen, Vestmanna (h.m.), lokið útbúgving sum løgreglumenn. Teir starvast á politistøðini í Havn.

## Andlát og jarðarferðir

**Hanus Hansen, Norðdepil**, andaðist 3. juni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 60 ára gamal. Kistan fer frá kapellinum heim í Betesda mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesda hósdagin kl. 13.30.

Kistan við **Erik Johannessen** fer úr **Vestmanna** kirkju mikudagin kl. 14. Tey, sum vilja minnast Erik, kunnu lata Eldrasambýlinum í Vestmanna eina gávu.

**Kirstin Borðoy**, vanliga nevnd **Kjúrstin**, ættað úr **Klaksvík**, andaðist á Gentofte sjúkrahúsi leygardagin 3. juni, 75 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Tjaldur ver vælkomið:

## Tjóðfuglin inn í gongina



Her er eitt tjaldur komið á gátt og bíðar eftir mati

Mynd: Ole Kristian Valle

Á grækarismessu verður hátíðarhildið at tjóðfuglur okkara, Tjaldrið, kemur higar til lands. Sum gamal siður er, verður í hesum sambandi grækarismessuhald hildið í Havn við at skótarnir ganga skrúgongu, og Havnar Hornorkestur spælir.

Eisini verður sangurin "Tjaldur ver vælkomið" sungin á Vaglinum, uttan at øll fólk vanliga hugsa um at bjóða tjóðfuglinum heim til tey sjálvi. Men tað eru tó nøkur, sum eru so heppin at fáa vitjan av tjøldrum, sum banka upp á dyrnar.

Í Varðabyrgi í Havn hava í fleiri ár verið tom tjøldur, sum ganga millum húsini og koma inn á gólvið hjá fólki.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Hanus Hansen**

Norðdepil

andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 3. juni, 60 ár gamal.

Kistan fer frá kapellinum heim í Betesda mikudagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Betesda hósdagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Ella, Vilhelm, John, Katrina og Mathilda**



*Vit gevast*

Vit vilja fegin takka viðskiftafólkum okkara fyri hesi mongu árini.
Vit rigga av nú, eftir at hava havt verkstað í 35 ár og bensinsølu í 18 ár. Hesi árini hava fleiri trúgv viðskiftafólk verið fastir kundar.
Øllum viðskiftafólkum okkara takka vit hjartaliga.

***Verkstaðið í Øravíkarlíð***
***V/ Finn og Ketty Andreasen***

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Johan Mørkøre**
Hósvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Leguhúsið í Nesvík.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Anna Maria, Eyðbjørg, Jógvan, Jóannes og Magnus Pauli**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona, mamma, vermamma og elskaða omma okkara

**Liss Knudsen**
Glyvrar

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.
Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og peningagávu.
Tøkk til tykkum øll, ið hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk fyri troystarrík orð og ein tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til við ervinum í Elim.

*Familjunnar vegna*
**Erhard, Andy, Niels Juul, Annika og Dan**